## Funnið mótstøðuført svínakrím

Tilvildarligt brúk av heiliváginum Tamiflu er helst orsøkin til, at heilsumyndugleikarnir í Meksiko og USA nú hava staðfest eitt mótstøðuført slag av sjúkuni Influensa A ella H1N1 tætt við amerikanska markið. Amerikanski heilststovnurin PAHO sigur, at tey hava funnið nakrar tilburðir, har Tamiflu ikki ger nakran mun. Í hesum viðfangi verður nevnt, at í Meksiko og Kanada ber til at keypa Tamiflu í hondkeypi. Hetta er kortini ikki fyrstu ferð, at læknar hava staðfest H1N1, sum er mótstøðuført ímóti Tamiflu. Aðrir tilburðir eru staðfestir í Danmark, USA, Kanada, Japan og í Hongkong.



## Heldur tok enn flogfør

Gongur tað, sum bretska stjórnin ætlar, skulu bretar, sum ferðast við flogfari innanlands, ferðast við toki ístaðin fyri. Tað sigur Andrew Adomis, flutningsmálaráðharri, við blaðið The Guardian, og hann leggur afturat, at ætlanin er komin væl áleiðis. Í fyrsta umfari verður ein nýggj jarnbreyt til snartok løgd millum London og Birmingham, og seinni skal hon leingjast norður til Skotlands, sigur ráðharrin. Hann leggur afturat, at málið við at brúka snartok heldur enn flogfør til stuttar ferðir er at verja umhvørvið við millum annað minni $CO_2$-útláti.



Tað verður í dag, at stýrið fyri Kringvarpið hevur fund, og tá verður avgjørt, hvat leiðslan ætlar at gera við Jógvan Arge

# Argelagnan avgerast í dag

**Hóast kringvarpsstýrið onki hevur við starvsetanir at gera, so staðfestir Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, at útspælið frá leiðsluni um Jógvan Arge ikki verður klárt fyrr enn eftir fundin**

STARV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri kortum kom fram, at tað ikki var rætt at siga Jógvan Arge upp í Kringvarpi Føroya, og tí er hann aftur fastsettur í Kringvarpinum, hóast hann hevur fingið 180.000 krónur í uppsagnarløn seinastu mánaðirnar.

Tað var Mentamálaráðið, sum gjørdi av, at uppsøgnin hjá Jógvan Arge skuldi ógildast, eftir at hann kærdi uppsøgnina.

Sjálvur visti Jógvan Arge ikki júst, hvat fór at henda í málinum.

- Eg havi ikki verið í samband við leiðsluna, so nú mugu vit bara síggja, hvat hendir. Sum nú er dugi eg illa at siga, hvat fer at henda, segði Jógvan Arge fríggjadagin.

### Leiðslan opin

Hóast Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, ikki hevur verið í samband við Jógvan Arge, og heldur ikki vil siga nakað um útspælið frá leiðsluni, so dugir hon at ímynda sær, at Jógvan Arge kemur aftur í Kringvarpið.

- Tað verður sjálvandi ein fíggjarligur smeitur hjá okkum, men vit eru opin fyri at fáa hann innaftur, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Hon leggur afturat, at hon ikki reiðiliga veit, hvat fer at henda, men hon staðfestir, at Jógvan Arge í hvussu so er ikki fer at gera tíðindi.

Spurd um hann fer at varpa fótbólt út um vikuskiftið, er svarið noktandi.

- Eg rokni ikki við, at tað verður longu um vikuskiftið, at Jógvan Arge verður at hoyra, um hann kemur aftur í starv. Hann hevur verið burtur leingi og má seta seg inn í tingini, greiðir kringvarpsstjórin frá.

Men onki verður avgjørt fyrr enn seinni í dag.



Mynd: Skipalistin

# Trolbátur tikin

**Skiparin á trolbátinum Sigrun, sum varð tikin á stongdari leið mánadagin, skal í dag taka støðu til, um hann góðtekur av veita eina millión krónur í trygd**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nakað eftir middag mánadagin tók vaktarskipið Tjaldrið trolbátin Sigrun, sum trolaði norðan fyri Mykines.

Vaktarfólk fóru umborð og ásannaðu, at Sigrun trolaði innan fyri 12 fjórðingar. Tað økið er stongt alt árið.

Illgruni er eisini um, at Sigrun hevur trolað á øðrum stongdum leiðum, samanlagt níggju ferðir.

Mánakvøldið kom Tjaldrið á Havnina við Sigrun.

Skiparin noktar seg sekan í at hava trolað ólógliga.

Linda Hesselberg, ákæri vil ikki upplýsa, hvat Sigrun hevði inni, og hvat reiðskapurin er verður.

Ákæruvaldið krevur, at skiparin setir eina millión krónur í trygd fyri at sleppa út aftur, og skiparin hevur lovað at koma við svari til tað í dag.

Sigrun hevur heimstað í Saltangará. Reiðari er Jónsvein Knudsen.